**Norðurlandahúsið í Føroyum søkir eftir móttøkufólki til hálvtíðarstarv**

Tú ert tann fyrsti, kundar og gestir hitta, tá teir ringja, skriva ella koma í Norðurlandahúsið.

Tú hevur gott yvirlit, ert blíð/ur og fyrikomandi. Tú megnar væl at handfara nógvar ymiskar uppgávur og menniskju í arbeiðsdegnum. Tú dugur væl at laga teg til ymsar umstøður, ert ágrýtin og megnar at arbeiða undir trýsti.

**Arbeiðsuppgávur:**
Vanligt móttøkuarbeiði so sum kundatænasta, svara telduposti og telefon, selja atgongumerki og handilsvøru, dagføra ymsar kunningarpallar, umseta úr skandinaviskum til føroyskt umframt annað fyrifallandi skrivstovuarbeiði.

**Førleikar:**

- Móttøkuútbúgving, skrivstovuútbúgving ella líknandi (royndir kunnu viga tyngri enn útbúgving)
- Góðan KT-førleika
- Góðan málkunnleika. Tú tosar og skrivar føroyskt og eitt skandinaviskt mál á høgum stigi, og dugur enskt í skrift og talu.

**Vit vænta, at tú:**

- Megnar at arbeiða sjálvstøðugt
- Ert tænastusinnað/ur
- Ert fleksibul
- Ert væl skipað/ur og opin fyri nýggjum avbjóðingum
- Megnar at handfara nógvar ymiskar uppgávur og menniskju í arbeiðsdegnum

Vit kunnu bjóða tær eitt starv í einum spennandi og livandi arbeiðsumhvørvi, har eingin dagur er eins, og har vit allatíð stremba eftir at mennast - bæði sum starvsfólk og stovnur.

**Lønar- og setanarviðurskifti:**
Løn og setan eru sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið, Starvsmannafelagið og Norðurlendska Ráðharraráðið. Starvið verður lønt eftir 3. lønarflokki .

Talan er um eitt hálvtíðarstarv (50%), við møguleika fyri fleiri arbeiðstímum í tíðarskeiðum. Arbeiðstíðin er aðruhvørja viku, seinnapart / kvøld og vikuskifti, og eftir tørvi. Starvið er tíðaravmarkað til 1 ár, møguliga kann starvið leingjast.

Vit ynskja, at tann, ið verður sett/ur, tekur við starvinum skjótast gjørligt.

**Umsóknarfreist: 29. januar 2021**

Stutt umsókn / motivatiónsskriv umframt lívsrensl skal sendast umvegis leinkið:
**https://www.norden.org/sv/node/48905**

Hevur tú spurningar um starvið, kanst tú seta teg í samband við Gunn Hernes, stjóra,
á teldupostadressuni gunn@nlh.fo ella við at ringja til móttøkuna á tlf. 351351.

Kunning um virksemið hjá NLH finnur tú á heimasíðuni www.nlh.fo